# Chr. Matras - aldarminning og Faroese Language Studies

TÍÐINDASKRIV

Tvær nýggjar bøkur frá Føroya Fróðskaparfelag, hin fyrra við fyrilestrum frá hátíðarhaldinum í sambandi við 100 ára dag Chr. Matras í des. 2000, hin seinna við greinum um føroyskt mál eftir Michael Barnes professara, University College London.

Christian Matras, skald og málfrøðingur, var føddur 7. desember 1900 og andaðist 16. oktober 1988. Hann legði eftir seg ein dýrmætan vísindaligan, mentanarligan og skaldskaparligan arv, sum eisini onnur enn føroyingar fegnast um. Í sambandi við 100 ára føðingardag hansara skipaðu Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag fyri almennum hátíðar- og fyrilestrahaldi dagarnar 7.-9. desember 2000 til at sýna minnunum um Føroya fyrsta professara virðing og takksemi. Medfyriskiparar vóru Føroya Landsbókasavn, Rithøvundafelag Føroya og Norðurlandahúsið í Føroyum. Fyrilestrarnir, sum vóru hildnir við hetta høvi, eru nú útkomnir í bók, sum Turið Sigurðardóttir, lektari á Fróðskaparsetrinum, hevur ritstjórnað.

Chr. Matras knýtti í starvi sínum Føroyar at umheiminum og umheimin at Føroyum, og hesin sjónarringurin er endurspeglaður í minningarhaldinum við fyrilesarum, ikki bara úr Føroyum, men eisini uttaneftir, umboðandi eitt fjølbroytt úrval av teimum økjum, evnisliga og landafrøðiliga, sum stóðu Chr. Matras nær. Gestafyrilesturin í sambandi við handing av sømdargávu úr Grunni Kristjans á Brekkumørk - grunni, sum Chr. Matras saman við Føroya Fróðskaparfelag stovnaði við Ossian-heiðursløнini í 1982 - helt Jonna Louis-Jensen, professari við universitetið í Keypmannhavn (hetta var 8. sømdargáva úr grunninum, latin Jeffrei Henriksen fyri virki hansara føroyskum máli at frama). Aðrir fyrilesarar vóru Martin Næs, Andrias Justesen, Jóhan Hendrik Winther Poulsen og Guðrun Gaard, Guðrún Kvaran úr Íslandi, Bo Almqvist úr Írlandi og Trygve Skomedal úr Noregi. Fyrilestrarnir mynda Chr. Matras ikki einans sum málvísindamann og skald, men eisini sum týðara - og sum menniskja.

Bókin, prentað á Hestprenti við sera vakrari kápumynd av bókamerkjatekning, Janus Kamban fyri mongum árum síðani gjørdi til Chr. Matras, er nummar 33 í røð frá Føroya Fróðskaparfelag, sum nevnist Supplementa til Fróðskaparrit. Hon er 118 bls. og fæst í bókasølunum fyri 148 kr. eintakið.

--------

Í meira enn eitt mannaminni hevur Michael Barnes, professari á Department of Scandinavian Studies við University College London, granskað og skrivað hópin av greinum um føroyskt mál. Hann kom blaðungur higar í 1965 á fimta Víkingafund (ráðstevnu fyri málfrøðingar, fornfrøðingar og søgufrøðingar við serligum áhuga fyri víkingaøld og miðøld) og setti sær tá alt fyri eitt fyri at læra seg føroyskt. Frammanundan var hann fullkønur í norskum og dugdi eisini íslendskt. Tað vardi ikki leingi, til hann kom á lagið við føroyskum, sum hann dagin í dag bæði dugir at tosa og ikki minst skriva.

Mangir eru studentarnir, sum Michael Barnes hevur undirvíst í føroyskum á deild síni, og flestir teirra hava verið eitt legg í Føroyum. Sjálvur hevur hann í meira enn einum umfari verið gestalærari á Føroyamálsdeildini.

Michael Barnes hevur skrivað almikið um norðurlendsku málini, bæði úr søguligum og nútíðarligum sjónarhorni. Høvuðsáhugaøki hansara eru rúnafrøði og norn, norrøna málið, ið var talað í Hetlandi og Orknoyggjum. Harumframt hevur hann skrivað nógv um málsøguna hjá norrønu málunum í tíðarskeiðinum 200-1300. Tær níggju greinirnar í "Faroese Language Studies" snúgva seg eitt nú um málsøgu, merkingarfrøði, orðalagslæru, formlæru og málrøkt. Harumframt er ein listi við greinum hansara um føroyskt mál.

Bókin er útkomin á forlagnum Novus í Oslo, sum í samstarvi við Føroya Fróðskaparfelag hevur latið prentað serupplag sum Supplementum 30 til Fróðskaparrit. Hon er 239 bls. og fæst í bókasølunum fyri 252 kr. eintakið.

---------

Tað er ikki meira enn ein mánaður, síðani tvær aðrar nýggjar bøkur komu frá Føroya Fróðskaparfelag. Onnur var ph.d.-ritgerðin hjá Kirsten Brix um prosaskaldskapin eftir Regin í Líð, hin ph.d.-ritgerðin hjá Anne-Kari Skarðhamar um skaldskapin hjá Chr. Matras. Eisini tær eru at fáa í bóksølunum fyri ávikavist 220 og 350 kr. eintakið.




# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflyggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Tveir politistar skulu setast 1/4-2002.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/10-2001




# Torbjørn hevur ærumeitt løgmann

**Orðini, sum Tórbjørn Jacobsen hevur latið fella um, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur eina fortíð, sum ger at hann ikki kundi sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi, eru so grovar skuldsetingar, at tær eru ærumeiðandi, um Tórbjørn ikki kann prógva tær, sigur Halgir Winther Poulsen, advokatur.**

POLITKKUR
*Rúnar Reistrup*

Tjóðveldistingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, er ikki kendur fyri at spara upp á hørðu orðini. Men onkuntíð kunnu orð gerast so ógvuslig, at tað kann vera revsivert at føra tey fram ógrundað. Tórbjørn Jacobsen er í løtuni í teirri støðu, at hevur løgmaður hug til tess, kann hann við góðum tannabiti stevna Tórbjørn Jacobsen fyri ærumeiðing, og tá verður tað luturin hjá Tórbirni Jacobsen at prógva, at skuldsetingar hansara ímóti løgmanni hava støði í veruleikanum.

Sosialurin hevur biðið advokatin Halgir Winther Poulsen um at meta, um orðini hjá Tórbirni Jacobsen geva løgmanni grundarlag fyri at stevna samgongufelaganum fyri ærumeiðing, og niðurstøðan hjá advokatinum er greið. Løgmaður hevur allar møguleikar at stevna, um so er at hann tekur Tórbjørn Jacobsen í álvara.



## Týðulig ærumeiðing

Tórbjørn Jacobsen hevði í bløðunum týsdagin eina hvassorðaða viðmerking, har hann millum annað óbeinleiðis legði Anfinn Kallsberg, løgmann og Jørgen Niclasen, vinnumálaráðharra, undir at hava framt lógarbrot. Tórbjørn skrivar í viðmerkingini, at "Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum, orsakað av einari gloymdari fortíð, har, ið ilt var at skyna á mørkunum, ímillum eins egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum".

- At siga, at Anfinn Kallsberg ikki kann vera ráðharri í nøkrum øðum landi – enn ikki Zimbabwe - er týðuliga ærumeiðandi og gevur løgmanni grundarlag fyri at stevna Torbjørn. Men tað er upp til Anfinn Kallsberg at velja um hann tekur hin partin í álvara ella ikki, sigur Halgir Winther Poulsen, advokatur.

## Skrivliga orðið vigar tungt

Tað er ikki óvanligt at hørð orð og skuldsetingar fúka ígjøgnum luftina, tá politikarar gerast heitir í onkrum kjaki, men sambært Halgir Winther Poulsen kunnu orðini hjá Tórbjørn Jacobsen ikki samanberast við ein orðadrátt millum tveir politkarar.

- Hatta eru ikki orð ígjøgnum luftina. Hatta er skrivað sum viðmerking til eitt aktuelt mál. Skuldsetingarnar eru soleiðis heldur ikki partur av nøkrum orðadrátti, sigur Halgir Winther Poulsen, advokatur.

Í samrøðu við Sosialin í gjár, segði løgmaður, at hann fór ikki at lata grovu skuldsetingarnar frá einum "fýri" sum Torbjørn ímóti Fólkaflokkinum standa eftir í leysari luft. Spurningurin er um Anfinn Kallsberg, løgmaður, velur at lata skuldsetingarnar hjá Tórbjørn Jacobsen ímóti sínum egna persóni standa ósvaraðar, ella hann velur at fara í rættin við tí fyri eyga at reinsa skuldsetingarnar av sær.

Tað veldst um løgmaður tekur Tórbjørn Jacobsen og skuldsetingar hansara fyri fult.

Fyrr hendi tað meir enn so, at politikarar stevndu hvørjum øðrum, men tey seinnu árini er hetta ikki komi fyri.

